# Á netið við fartelefon

**Nú ber eisini til at fara á internetið við fartelefon. Fyri kortum fór Føroya Tele undir at bjóða viðskiftafólki sínum WAP. Tænastan er á byrjunarstigi, men verður ment so við og við**

Fyri kortum fór Føroya Tele undir at bjóða viðskiftafólki sínum WAP. Henda tænasta ger tað møguligt at fara á internetið, uttan at sita við eina teldu heima við hús, og tann møguleikin hevur verið til staðar uttanlands í eina tíð.

Nú er hann so komin til Føroyar og seinastu tíðina hevur Føroya Tele fyrireikað seg til at bjóða viðskiftafólkunum hesa tænastuna.

WAP, sum stendur fyri "Wireless Application Protocol", er ein opin standardur fyri tráðleysum samskifti millum fartelefon og internetið. Tað hevur við sær, at tað ber til at koma í samband við internetið beinleiðis frá fartelefonini.

WAP-útgávan av internetinum er ein skerd útgáva av tí internetinum, sum netbrúkarar vanliga kenna. Tað minnir eitt sindur um tekstvarp, har tað m. a. ikki ber til at síggja litir og myndir. Ikki ber til at lesa vanligar heimasíður, men bara tær síðurnar, sum eru gjørdar til WAP. Fyrimunurin er so harafturímóti, at tú kanst fáa kunning, líkamikið hvar tú ert staddur.

## Føroyska wap-síðan

Føroya Tele hevur longu nú lagt út eina heimasíðu til wap-brúkararnar. Á hesi síðu ber til at lesa tíðindir - føroysk, útlendsk og ítrótt - leita eftir telefonnummrum, vitja portalar, spæla spøl, og síðst, men ikki minst, kanna um nakar teldupostur er komin, sum tú ikki hevur lisið.

Tað er vert at leggja sær í geyma, at útboðið av tænastum til WAP enn bara er á byrjunarstigi og at fleiri tænastur koma, so hvørt sum tøknin verður klár og tænasturnar verða mentar. Um heilt stutta tíð verður møguligt at síggja GSM-nýstluna á WAP.

Í løtuni er tað so, at øll haldini hjá Føroya Tele, uttan teletíðarhaldini, kunnu brúka WAP-tænastuna frá byrjan. Tænastan kostar 1,95 um minuttin umframt uppringargjaldið, men einki stovningargjald ella mánaðargjald. Prísurin er tann sami alt samdøgrið.

Treytin fyri at kunna brúka WAP er sjálvsagt, at brúkarin hevur eina WAP-fartelefon, sum eisini er sett upp til WAP.

Veist tú ikki, hvussu hetta skal gerast, kanst tú hyggja inn á www.wap.fo, á internetinum. Har stendur ein vegleiðing um, hvussu telefonin skal setast upp. Har sært tú eisini eitt yvirlit yvir, hvørjar fartelefonir kunnu brúkast til WAP.

At Føroya Tele fer undir WAP er ikki so løgið. Hetta er eitt stig á vegnum móti mobila internetinum og tá framtíðartøknin, sum eitt nú GPRS, verður tikin í nýtslu, verður ferðin á WAP enn størri, samstundis sum ljóð og grafikkur eisini verður ein møguleiki. Tó skal havast í huga, at tað, fyri at kunna nýta GPRS, verður neyðugt at hava eina GPRS telefon.

Henda tøkni er ikki komin til okkara enn, men vónandi verður hon her fyrst í komandi ári.



*- WAP er ein spennandi møguleiki hjá fólkið, sum vilja hava kunning, líka mikið hvar tey eru, sigur Jónhild Rasmussen, tænastumennari hjá Føroya Tele*

# Samtala um IP-net

**Síðani februar í ár hevur Føroya Tele brúkt "Voice over IP" í egnum samskifti og nú verður henda tænasta eisini boðin viðskiftafólkunum. Tað ger, at fyritøkur, sum eitt nú hava fleiri deildir kring landi, kunnu klára seg við ein vekslara á høvuðsskrivstovuni**



*Føroya Tele hevur sjálvt brúkt "Voice over IP" síðani februar og royndirnar av tí eru so góðar, at allar deildirnar áðrenn langt um líður eru undir somu skipan*

Nú ber til hjá viðskiftafólkunum hjá Føroya Tele, at fáa sær "Voice over IP". Henda tænasta er serstakliga væl egnað hjá fyritøkum, sum hava fleiri deildir, tí ístaðin fyri at koyra samtalurnar, millum deildirnar, gjøgnum býlinjur, verða tær koyrdar um innanhýsis netið hjá fyritøkuni.

Ein fyrimunur við hesi loysnini er, at fyritøkan, tá deildirnar samtala sínámillum, sparir útreiðslurnar til býlinjurnar, tí samskiftið fer fram á egnum netið. Tí verður tað ókeypis.

Ein annar fyrimunur við hesi loysnini er, at tað ber til at hava allar deildirnar undir einum vekslara. Eru deildirnar knýttar saman undir einum og sama neti, kunnu tær koyra undir einum vekslara.

Føroya Tele koyrir sjálvt við "Voice over IP". Síðani februar í ár hevur høvuðsdeildin havt slíkt samband við deildina í Fútalág og í Klingruni, og tað hevur virkað so væl, at Klaksvík varð løgd undir somu skipan í apríl, og í hesum mánaðinum verður nýggja støðin í Runavík eisini løgd undir hesa skipan, sigur Erik E. Thomsen, deildarleiðari á Vinnudeildini.

Hann leggur afturat, at tað í roynd og veru bara er ein spurningur um tíð, áðrenn allar deildirnar hjá FT koyra undir hesi skipan.

Tað er nú ikki bara Føroya Tele sjálvt, sum koyrir við hesi skipan. Í juni mánaði í ár varð slíkt samband tikið í nýtslu millum høvuðsdeildina hjá Tryggingarfelagnum Føroyar og eina deild uttanfyri húsið. Sum skilst hava hesar royndir virkað so væl, at tað verður arbeitt víðari við teimum.

Harumframt, sigur Erik E. Thomsen, hava fleiri viðskiftafólk víst stóran áhuga fyri "Voice over IP", og tí roknar hann við góðari undirtøku.

Hóast tað kanska kann ljóða eitt sindur tilforlátiligt út, bara at fáa sær eina telefonskipan, sum skal koyra á egnum netið, so er neyðugt at vera vísur í, at netið kann klára at handfara samtalurnar.

- Netið skal vera til reiðar at senda og móttaka pakkar av ljóði uttan at oyðileggja samtalurnar, sigur Erik E. Thomsen.

Hann greiðir frá, at ein av trupulleikunum við netunum er, at seinkingar kunnu oyðileggja samtalurnar og tá er einki vunnið við "Voice over IP". - Tí má vissa vera um, at netið klárar at handfara ljóðpakkarnar. Í veruleikanum merkir tað, at netið skal prioritera ljóðpakkarnar hægri enn pakkarnar við data, sigur hann.

Tey, sum hava hug at síggja og royna "Voice over IP", kunnu gera hetta á vørumessuni, sum verður um vikuskiftið. Har ber til at síggja og hoyra, hvussu tað hoyrist og virkar, umframt at tað ber til at fáa at vita, hvørji krøv skulu vera gingin á møti, um tú ætlar tær at fáa "Voice over IP".









